## Pena vrakaður á Argjum

Argentiski verjuspælarin Leonel Pena, sum skuldi styrkja AB í ár, verður helst vrakaður á Argjum. Heimasíðan hjá AB skrivar, at Pena ikki hevur livað upp til tað, sum væntað varð av honum, og at útlendskir spælarar eiga at verða ein veruligur styrkur. Sjúrður Olsen, formaður í FC Argir, sigur, at helst fer Pena av landinum aftur.



## Malouda á veg úr Chelsea

Tað hevur ikki gingið eftir vild hjá franska Florent Malouda, síðani hann kom til Chelsea í fjørsummar, og nú verður tosað um, at Malouda er á veg úr felagnum, tí hann er ikki fastur maður á liðnum. - Eg vil spæla meira, og eg havi nú tríggjar mánaðir afturat til at vinna mítt pláss á liðnum. Um eg ikki megni tað, má eg taka ein støðu til, hvat so skal henda, sigur Malouda við Sporting Life.

Kyndil-VB 18-31 (9-15)

# VB óvæntaða mótstøðu



*Beinta Laursen úr Kyndli steðgar Lailu Jespersen úr VB*

*Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir*

**Vágskvinnur vóru favorittar at vinna dystin í Havn, men miðskeiðis í dystinum eydnaðist Kyndli at spæla við og kløkka VB, sum tó at enda vann sannførandi**

HONDBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

VB hevur framvegis góð kort á hondini, nú bara trý umfør eru eftir av Sunset-kappingini. Sum væntað, fekk VB bæði stigini í gjár, tá mótstøðuliðið í ítróttarhøllini á Hálsi var Kyndil, sum næsta kappingarár skiftir um pláss við VÍF, ið kemur upp úr 1. deild.

Men hóast tølini siga, at VB vann dystin við 13 málum, so var veruleikin í eina góða løtu á vøllinum ein annar, tí Kyndil megnaði at bíta frá sær. Tá átta minuttir vóru eftir av fyrra hálvleiki, var bara eitt mál á muni, og 10 minuttirnar inn í seinna hálvleik vóru bara trý mál á muni.

Men so setti VB ferð á og skoraði fimm ferðir á rað, uttan at nakað riggaði hjá Kyndli, og so var tann dysturin avgjørdur.

### Skjótálop avgjørdu

Hjá Kyndli var tað serliga málverjin, Tomma Petersen, sum við fleiri góðum bjargingum gekk undan, og hinar fóru fegnar eftir slóðini. Kyndil fekk so víst, at liðið eisini kann spæla við iðhvørt.

Kann vera, at VB brúkti henda dystin til at royna ymiskt, ið dirvi kanska ikki hevði verið til, um talan var um sterkari mótstøðulið, men tað tekur einki frá Kyndli. Kyndil hevði heldur ikki orkuna til at halda einum so frægum liði sum VB, og serliga gav Aukse Vysniauskaite verjuni trupulleikar, tá hon fleiri ferðir fór ígjøgnum mitt fyri.

Ímóti endanum skolaðu skjótálopini ímóti málinum hjá Kyndli, ið fekk lítið at bera til í hinum endanum. Gurið Mortensen vísti tá onkur av sínum bestu kynstrum, so bólturin ikki bara var skotin í málið, men við stíli.

**Kyndil-VB 18-31 (9-15)**
**Kyndil:** Jacklin Durhuus 7, Ása Christiansen 2, Barbara Egilstrøð 2, Linda Johannesen 2, Jórun Ludvig 2, Beinta Laursen 1, Súsanna Petersen 1, Randi Wardum 1
**VB:** Aukse Vysniauskaite 8, Gurið Mortensen 6, Daiva Toumaite 6, Laila Jespersen 3, Una Egilsdóttir 2, Monika Samuelsen 2, Svava Vestergaard 2, Theresa Joensen 1, Bára Mortensen 1

StÍF-Tjaldur 24-24 (15-6)

# StÍF mundi tikið Tjaldur

**Kvinnurnar hjá StÍF tóku Tjaldur á bóli í fyrra hálvleiki, men funnu ongantíð rútmuna aftur í seinna hálvleiki. Tjaldur slapp tí innaftur í dystin og kláraði javnleikin**

HONDBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Síðstu fýra minuttirnar av Sunset-dystinum á Skála í gjár stóð púra fast hjá StÍF, sum annars hevði havt Tjaldur á knøunum. Ninna Katrin Johansen, sum hevði lagt StÍF framum 24-22, fekk besta møguleikan við brotskasti, men skjeyt við síðuna.

Í staðin kundi Tjaldur við tveimum málum aftrat røkka upp á javnleikin, sum sanniliga sá út til at vera langt burturi, tá fyrri hálvleikur var av. Tá var StÍF á odda við níggju málum, og einki røktist fyri, at gestirnir av eystara armi á fjørðinum skuldu taka tey aftur.

StÍF hevur roynt tað fyrr, at renna Tjaldur meira ella minni um koll við skjótum spæli, samstundis sum verjan er nærløgd. Og hetta riggaði til fulnar í fyrra hálvleiki.



*StÍF var um reppið at skapa sensatiónina á Skála, tá Tjaldur var hildið á pínubonkinum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Sensatiónin kom ikki

Men StÍF fann ongantíð rútmuna aftur í seinna hálvleiki, tá Tjaldur sá út til at hava tikið seg saman, tí uppdekkingin hjá StÍF var ikki líka góð, eins og tað heldur ikki eydnaðist at fáa sett ferðina uppaftur.

Og tá so Tjaldur eftir bert einum korteri hevði fingið javnleik 19-19, fjaraði sensatiónin burtur, hóast StÍF stóð seg væl eftir hetta og ímóti endanum hevði fyrimunin, ið kundi gjørt munin og givið sigurin.

Tjaldur reið stormin av og er nú eitt stig aftan fyri VB og eitt stig framman fyri Neistan, sum eru tey bæði liðini, tær gulu úr Runavík kappast mest við í løtuni, nú FM-finalan ímóti Stjørnuni nærkast.

**StÍF-Tjaldur 24-24 (15-6)**
**StÍF:** Rebekka Justinussen 6, Louisa Andreasen 5, Ninna Katrin Johansen 5, Fríðrún Danielsen 4, Anna Petersen 3, Súnfríð Johansen 1
**Tjaldur:** Adina Petrea 8, Marinela Patru 5, Jacoba Langgaard 4, Annika Thomsen 3, Alina Olaru Anghel 2, Heidi Sevdal 1, Sarah Ann B. Thomsen 1